# Sjónarkanning í samband við koyrikort

Sjónin verður kannað fyri hvørt eygað sær og binokulært (bæði eygu samstundis). Sjónarstyrkin kann antin ásetast í brøki ella sum desimaltal. Í brøki er teljarin avstandurin í metrum frá talvuni (vanliga 6 m.), og nevnarin heiti á linjuni á talvuni, har allir bokstavirnir kunnu lesast.

| Sjónarstyrki fyri flokk 1 | |
|---|---|
| *6/4,5* | *1,3* |
| *6/6* | *1* |
| *6/7,5* | *0,8* |
| *6/9* | *0,7* |
| *6/10* | *0,6* |
| *6/12* | *0,5* |
| *6/18* | *0,3* |
| *6/24* | *0,25* |
| *6/36* | *0,17* |
| *6/60* | *0,1* |

*Sjónarkrav fyri flokk 1* (line below 6/12 – 0,5)

| Sjónarstyrki fyri flokk 2 | |
|---|---|
| *6/4,5* | *1,3* |
| *6/6* | *1* |
| *6/7,5* | *0,8* |
| *6/9* | *0,7* |
| *6/10* | *0,6* |
| *6/12* | *0,5* |
| *6/18* | *0,3* |
| *6/24* | *0,25* |
| *6/36* | *0,17* |
| *6/60* | *0,1* |

*Sjónarkrav fyri flokk 2 - á betra eyganum*

**Flokkur 1**
Fyri flokk 1 verður hugt at hvussu sjónin er binokulært (bæði eygu samstundis).

*Sjónarkrav:*
Samlaða sjónin fyri bæði eygu samstundis skal í minsta lagi vera 6/12 (0,5), sum er hálv sjón. Er sjónin verri, verður krav um brúk av brillum ella linsum sett á koyrikortið (átekning 01.06), og skal sjónarkanning við brillum ella linsum tá gerast. Kravið við brillum ella linsum er tað sama sum uttan við brillum ella linsum.

**Flokkur 2**
Fyri flokk 2 verður hugt at eygunum hvør sær.

*Sjónarkrav:*
Annað eygað skal í minsta lagi síggja 6/7,5 (0,8) og hitt eygað skal í minsta lagi síggja 6/60 (0,1). Sjón skal vera í báðum eygum. Er sjónin verri, verður krav um brúk av brillum ella linsum sett á koyrikortið (átekning 150*). Men er sjónin harafturat verri enn 6/12 (0,5) binokulært, í flokki 1, verður átekning 01.06 sett á koyrikortið.

**** Kunngerð um koyrikort og koyrifrálæru:***
*Átekning 150: Handhavin skal nýta brillur ella linsur, tá hann koyrir akfør í bólkunum C, C/E, D og D/E, í sambandi við vinnuligan fólkaflutning og í sambandi við virksemi sum koyrilærari.*

AKSTOVAN